**Dagur:** 14. juli 2003
**Skrátal:** 44202/2
**Máltal:** 030652/3

**Handilsskúlin**

**Lærugreinakunngerð** **Juni 2003**

# Samfelagslæra C

## 1. Endamálið

**1.** Endamálið er, at næmingurin fær fatan av týdninginum búskapar-, politisk, sosial og mentanarlig viðurskifti hava fyri samfelagsligu menningina, umframt at áhugi næmingsins fyri samfelagsligum viðurskiftum verður mentur. Næmingurin skal eisini læra at skilja týdningin vaksandi altjóðageringin hevur fyri búskaparligu og politisku menningina í Føroyum og greiða frá menningini í týdningarmestu samhandilslondum Føroya, eins og ES-samstarvinum.

## 2. Undirvísingin

**2.1.** Í undirvísingini verður undirvíst í 4 evnum, sum eru nærri lýst í **3.1. – 3.4**.

**2.2.** Undirvíst verður í samfelagsviðurskiftum í breiðari merking. Dentur skal leggjast á búskaparlig og politisk viðurskifti í dagsins samfelagi.

**2.3.** Tvørfakligir tættir verða tiknir upp, har høvi býðst.

**2.4.** KT er partur av undirvísingini.

**2.5.** Í sambandi við høvuðstættirnar, ið nevndir eru niðanfyri, verða lisnar einar 300 síður.

## 3. Innihaldið í undirvísingini

**3.1.** *Politisk viðurskifti*
Undirvísingin tekur støði í dagsins samfelagsspurningum, og hevur til endamáls at fáa næmingin at fata tann týdning, ið politiskar hugsjónir, politiskir flokkar, veljarar, áhugafelagsskapir, grásrótarørslur og miðlar hava fyri menningina.
Undirvísingin fevnir um uppgávur og skipanir hjá stjórnarvaldinum og skal lýsa, hvussu politiska avgerðargongdin fer fram. Møguleikarnir fyri ávirkan hjá einstøku pørtunum verður umrættur.
Dentur verður lagdur á, at næmingurin fær eina fatan av politiskum samskifti, m.a. í sambandi við ymisku valini.
Evnini skulu setast í eitt søguligt høpi.


MENTAMÁLARÁÐIÐ • HOYVÍKSVEGUR 72 • POSTRÚM 3279 • FO-110 TÓRSHAVN
(+298) 35 50 50 • (+298) 35 50 55 • MMR@MMR.FO

**3.2.** *Arbeiðsmarknaður*
Undirvíst verður í lóggávu og avtalureglum, sum eru galdandi á arbeiðsmarknaðinum.
Undirvísingin umfatar lógir og avtalur, sáttmálar, rættarskipanina og lóggávuna viðvíkjandi arbeiðsumhvørvi, arbeiðsloysi og arbeiðsávísing.
Evnini verða sett í eitt søguligt høpi og samanborin við okkara grannalond og ES.

**3.3.** *Samfelagsbúskapur*
Undirvísingin tekur støði í løtubærum javnvágstrupulleikum í føroyska búskapinum, og samfelagsbúskaparligu viðurskiftini verða viðgjørd í søguligum høpi.
Ymiskir samfelagsbúskaparlig stevnumið og møguligar andsøgnir í stevnumiðunum verða lýst. Í hesum høpi verða umhvørvisspurningar eisini lýstir.
Ymisk búskaparpolitisk amboð at loysa javnvágstrupulleikar og til at røkka stevnumiðunum verða greinað og mett og sett í samband við aktuellu politisku og altjóða støðuna og møguleikarnar.
Lýst verður, hvussu broytingar í búskaparpolitikkinum ávirka búskaparstøðuna hjá fyritøkum og húsarhaldum.
Tað hevur stóran týdning, at samanhangurin millum politiskar og búskaparligar skipanir verður væl lýstur.
Evnini verða eisini lýst í ES-høpi.

**3.4.** *Altjóða viðurskifti*
Undirvíst verður í samanspælinum millum søgulig, búskaparlig, politisk og mentanarliga viðurskifti.
Undirvísingin tekur støði í løtubærum altjóða spurningum og umfatar støðu Føroya í altjóða búskapi og politiskum samstarvi. ES og tess menning verður eisini lýst við støði í ítøkiligum og løtubærum spurningum.
Menningartekin í uttanríkishandli Føroya, skilt á vørur og lond, verða lýst, saman við altjóða handli annars.
Undirvíst verður í týdningarmestu samhandilslondum Føroya.
Arbeitt verður við mentan og mentanarmunum, ið geva næminginum fatan av týdninginum, mentanarlig viðurskifti hava fyri handil.
Altjóða tilfeingis- og umhvørvistrupulleikar verða viðgjørdir. Í hesum sambandi verða politisk, búskaparlig og tøknilig áhugamál viðgjørd.

## 4. Próvtøka

**4.** Hildin verður ein munnlig próvtøka.

**5.1.** Fyri næmingar, ið fara til próvtøku eftir vanligum treytum, er próvtøkupensum umleið 225 síður, har øll evnini, sum eru nevnd í **3.1.-3.4.**, eru umboðað.

**5.2.** Fyri sjálvlesandi og næmingar, ið fara til próvtøku eftir serligum treytum, er próvtøkupensum tað sama sum lesipensum.

**5.3.** Munnliga próvtøkan fevnir um próvhoyring í lisnum og í ókendum tilfari. Munnliga próvtøkan fevnir um próvhoyring í 20 minuttir, íroknað próvtalsgeving. Próvtakarin fær umleið 40 minuttir til fyrireikingar, og tá er vegleiðing og tilfarsútflýggjan íroknað. 3 próvtakarar verða próvhoyrdir um tíman, íroknað próvdøming.

**5.4.** Próvtakarin fær ein próvtøkuspurning, sum er býttur sundur í undirspurningar. Spurningarnir skulu umboða pensum. Í uppgávunum er t.d. blaðgrein, talvur, myndir, sum ikki eru nýtt í undirvísingini. Uppgávurnar skulu geva næminginum møguleika at vísa evni at greiða frá, greina og meta um fakligar spurningar. Sami próvtøkuspurningur kann bert nýtast tveir ferðir sama dag.

**5.5.** Til próvtøkuna eru hesir hjálparmiðlar loyvdir:
Í fyrireikingartíðini: tilfar, sum hoyrir til próvtøkuspurningin, bøkur og annað tilfar, sum stendur í pensumuppgevingunum. Harumframt egnar uppskriftir.
Undir próvhoyring er tað loyvt próvtakaranum at styðja seg til próvtøkuspurningin og tilfar, sum hoyrir til próvtøkuspurningin, umframt til uppskriftir gjørdar í fyrireikingartíðini, men eitt beinleiðis handrit til upplestur telur ikki uppeftir í dømingini.

**5.6.** Í dømingini av avriki próvtakarans verður dentur lagdur á, at hann vísir hollan kunnleika til høvuðsøkini í lærugreinini og nýtir tey hugtøk, ið eru knýtt at henni.

**6.** Givið verður 1 próvtal fyri munnliga avrikið við støði í einari heldarmeting.